LANDSROYND 4. flokkur

Føroysk fyrisøgn

apríl-mai 2013

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir í millum skákstrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Tøl skulu skrivast við bókstøvum. Øll tekn eru tilskilað, bara punktum skulu lesast. Loyvt er næminginum at hava hjálparmiðlar við, t.d. orðabøkur og mállæru.)

# /**Hundur mín**/

/Eg **eiti** Annika/, og eg eri **tíggju** ár/. Mær **dámar** so væl/ **øll** djór/, men serliga hundar eri eg **góð við/**. Eg havi **altíð/** ynskt mær ein **hund/**, men vit **hava ongantíð/** havt **nakran/**. So ein **dagin/**, **tá ið** mamma/ **var** komin/ **eftir** mær í skúlanum/, **stóð** ein kona í túninum/ **hjá okkum/** og **bíðaði/ eftir** mammu og mær/.

**/Tað var** ein granni/, og hon **spurdi/, um** vit **vildu hava/** ein **hundahvølp/.**

**/Hon hevði** hann/ **við** sær/, **hann** var so **fittur/,** svartur og **hvítur/**.  Mamma **segði** fyrst nei/. So fortaldi **konan**/, at tey ætlaðu **at drepa** hvølpin/, tí hon **hevði verið/ hjá** fleiri fólkum/ og **roynt** at **fáa** tey/ at **taka** hann/**, men øll/** høvdu sagt **nei/**. Mamma **lovaði  so/**, at vit kundu **royna/** at **hava** hann/ í einar **tveir dagar/** og so **vita/**, **hvussu tað gekk/**. **Tá ið** vit komu inn/ til **okkara/**, settu vit hann **niður** á køksgólvið/. Hann **gekk** runt/ og **snoddaði/. Seinni** um dagin/ fóru vit at **keypa** mat/ og **annað/** til **hansara/**.

/Dagin **eftir sóu** vit/, at **hundurin** treivst væl/. Hann **hevði** longu vant seg/ **við** heimið/, **sum** hann nú/ var **komin** í/. Eg og systkin míni **fóru** túr/ við **honum/** og **spældu** við hann/.
/Vit **hava enn** hundin/ í **dag/**, og hann er so **góður** í sær/. Nú eru **tríggjar** vikur/, síðani vit **fingu** hann/. Hann **svevur/** í **mínum** kamari/, og eg eri sera **góð** við hann/. Hann **eitur** Snar/. Hann **liggur/** í **einum kassa** um náttina/. Tað er **abbi**/, sum **hevur** smíðað **kassan/**.
/Vit hava keypt **honum** nýtt hálsband/. Har **stendur/, /hvussu** hann **eitur/**, **hvar** vit búgva/ og **okkara** telefonnummar/. **Tað** er so **stuttligt**  at hava ein hund/.